






# Planet Aw

**Í gjárkvøldið var Planet Awards 2009 í REX. Tey bestu innan føroyskan tónleik vóru funnin og heiðrað, og við fleiri tónleikaframførslum bjóðaði Miðlahúsið gestunum eitt fjølbroytt og undirhaldandi kvøld**



**Ársins Songkvinna gjørdist Eivør Pálsdóttir, sum byrjaði við bólkinum Click-haze, og seinni hevur ment seg til at verða ein tann største songkvinnan í Føroyum, og ivaleyst í heiminum eisini.**



**Ársins Sangari gjørdist Brandur Enni, sum gjørdist landskendur sum unglingi, men seinni hevur gjørt nógv um seg í Svøríki og í Føroyum.**
**Danski poppsangarin René Dif handaði hesa virðisløn, og hann legði dent á, at Brandur var ein føroyskur tónleikari, sum honum dámdi væl og vónaði at síggja meira til í framtíðini.**